## Høgir hælir til pinkubørn

Seinastu tíðina hevur tað heilt stóra til pinkubørnini í USA verið skógvar við høgum hælum. Nú kemur hetta rákið eisini til Eoropa, har bretska mamman, Julia Taylor, á heimasíðuni www.heelsforher.co.uk, er vorðin umboðskvinna fyri smáu damuskógarnar. Teir eru at fáa í alskyns litum og mynstrum: til dømis leopard og zebra, í ljósareyðum og svørtum. Julia Taylor roknar við, at skógvarnir verða at finna undir nógvum jólatrøum í ár. Hon lovar eisini, at skógvarnir á ongan hátt eru skaðiligir fyri smáu barnaføturnar, tí teir eru sum smáir skóleistar, har bleytir hælir eru seymaðir undir.



## Gomul landakort í skúlanum

Tað er ikki bara í Føroyum, at skúlafólk av og á kæra seg um, at frálærutilfarið er ov gamalt og tí ikki tíðarhóskandi. Tað sama er galdandi nógvastaðni í Danmark. Eitt nú skrivar Fyns Stiftstidende, at í fleiri skúlum har eru heims og Evropa-kortini alt ov gomul, soleiðis at á teimum evropeisku kortunum er Jugoslavia framvegis til, og Týskland er framvegis í tveimum. Felagið hjá donskum skúlanæmingunum krevur tí, at kommunurnar játta teir neyðugu pengarnar, so skúlarnir kunnu fylgja við tíðini.

# Himmalskir tónar í Vesturkirkjuni



*Eivør var ein sannur eingil – bæði á at líta og á at lýða*

*Mynd: Rigmor Dam*



*Stórsligin konsert í Vesturkirkjuni Sunnukvøldið*

*Mynd: Ólavur Frederiksen*

Lummaturrikløðini komu veruliga til sín rætt, tá Tórshavnar Manskór og kórið Eystanljóð úr Gøtu og Leirvík høvdu konsert í Vesturkirkjuni sunnukvøldið.

Solistar vóru Eivør Pálsdóttir og Unn Patursson, og eins og seinast, tá ið Eivør Pállsdóttir var gestasangari á jólakonsertini í Vesturkirkjuni, máttu fólk leita sær til kirkjuna í góðari tíð, um tey vildu hava pláss. Nógv máttu tíverri venda við aftur, ella standa úti í forkirkjuni.

Um ein ikki longu var komin í jólahýr frammanundan, so var hetta eitt upplagt høvi at lata seg tøla. Eitt vælupplagt og professionelt Tórshavnar Manskór, Eystanljóð og einglaljóð frá Eivør Pálsdóttir og Unn Paturson bjóðaðu jólunum vælkomnum við lít. Við felagssangi, trompetsolisti og himmalskum sangi titraðu hjartastreingir saman við tónleikaundirspælinum, so loftið lyftist uppfrá. Sjáldan upplivað vit so stórsligna og vakra framførslu her á landi.

**rd**

# Mjúklig bókaløta



*Gólvið í Dansistovuni var bjálvað við heitum seyðaskinnum, sum børnini sótu og lógu á.*

*Mynd: Rigmor Dam*

Dansistovan í Norðurlandahúsinum var sunnudagin umskapað til "søgusigaraholu". Gólvið var bjálvað við mjúkum seyðaskinnum, og børnini sótu og lógu pinnastill og lýddu á, meðan føroyskir høvundar lósu upp úr nýggjastu útgávunum, sum koma út til jóla.

Tey, sum framførdu vóru: Dánjal á Neystabø, sum sang og spældi á tangentar, áðrenn hann læs upp úr nýggju bókini „Dronguri sum gloymdi, hvussu man spælir“. Sólgerð Andreassen læs upp úr bókini „Knassi og Rokkarin“ og Marjun Kjelnæs úr „Hvør fjalir seg í ferðataskuni?“, sum tær báðar hava skrivað og givið út. Gunnvá Zakariassen læs úr „Skrímslasótt“, ið Rakel Helmsdal hevur verið við til at skriva. Eisini læs Rakel Helmsdal sjálv úr nýggjastu bók síni, „Várferðini til Brúnna“. Oddfríður M. Rasmussen læs úr „Innantanna Anna og Túsundbeinið Súni“, sum hann júst hevur givið út, og til endans læs Hans Tórgarð úr nýggjari bók eftir Berg Rasmussen, "Sigursteininum" eitur hon.

Ikki kann sigast annað enn, at føroyska barnabókadýrgripurin økist nógv í virði hendan jólamánaðin.

**rd**